# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæra móðir mín

**Maria Rubeksen**
(Maria í Ruba)

andaðist fríggjadagin 27. november, 94 ára gomul.

Bønarhald verður á í kapellinum á Landssjúkrahúsinum sunnudagin kl. 16.00.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mánadagin 30. november kl. 13.00.

**Effie**

Tey, ið vilja minnast Mariu, kunnu lata eina peningagávu til »Porto til Sunnudagsblaðið«, konta 495.815.4 í Eik.

**Føðingar**

26. oktober fingu Hjørdis og Sigurð Marner Simonsen, Keypmannahavn, ein son. Hann vigaði 555 gr. og var 30 cm. langur.

15. november fingu Betta og Arnold Joensen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3800 gr.

17. november fingu Nanna og Harry Knudsen, Glyvrar, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

19. november fingu Vónbjørt Tróndheim og Djóni í Geil Johansen, Hoyvík, tvíburðar, gentur. Onnur var 51 cm long og vigaði 3080 og hin var 52 cm long og vigaði 3645 gr.

20. november fingu Jensa Jensen og Edmund Djurhuus, Vágur, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3200 gr.

20. november fingu Stine og Kristian Herlufsen, Skipanes, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3570 gr.

21. november fingu Katrin Simony Knudsen og Terji Rosenmejer Mikkelsen, Argir, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3090 gr.

22. november fingu Súsanna K. og Dávur K. Glerfoss, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4000 gr.

23. november fingu Ann og Rósing Thomsen, Strendur, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 3950 gr.

23. november fingu Sólrun Dánjalsdóttir og Allan Djurhuus, Vestmanna, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3700 gr.

24. november fingu Heidi og Sjúrður Vatnsdal, Århus, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3600 gr.

25. november fingu Una á Stein og Tórstein á Steig, Sandavágur, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

26. november fingu Lis Egholm og Dánjal Hansen, Saltangará, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3170 gr.

26. november fingu Ann-Mari og Jan Petersen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3100 gr.

# Hanna Olsen 65 ár



Hósdagin 26. november fylti Hanna Olsen, bestýrari á Sjómansheiminum Bethel í Keypmannahavn, 65 ár. Hanna er ættað úr Kollafirði og er yngst av seks systkjum. Foreldur hennara vóru Hansina og Marius Fr. Joensen. Hon er gift við Jón M. Olsen, sonur Jensiu og Magnus Olsen úr Skálavík og fingu tey 10 børn.

Hanna og Jón fluttu til Danmarkar í 1989 sum bestýrarapar á Sjómansheiminum Bethel í Nyhavnini, so hon hevur sostatt eisini 20 ára starvsdag í hesum døgum.

Í sambandi við at Hanna hevur verið bestýrari í 20 ár, og at hon fylti 65 ár, var móttøka á Bethel hósdagin, har fleiri nýttu høvið at heilsa upp á hana.

Altíð eru vit vælkomin á gátt hjá teimum. Ofta eru tey í Føroyum hjá teirra nærmastu, hóast seks av teirra børnum við familjum hava búsett seg í Danmark.

Nógv kundi verið sagt um Hannu, sum hevur verið er eitt arbeiðsjarn og ein diplomatur sum fáur.

Ein viðmerking, ið ein av teirra trúfastu vitjandi hevði, sum kom á gátt í Nyhavnini, var, at um Hanna var ung í dag, so átti hon at verið „klonað". So stóra dygd sá hann í henni og teirri ábyrgd sum hon hevði fyri sínum gestum og sínum starvsfólki.

So góða "gamla fru Olsen" Hjartaliga tillukku við føðingardegnum: Vit vóna at tit hava havt ein góðan dag.

**ynskja vinir**



**Dagurin**
27. november. Facundus. Var úr Leon í Spania, deyður umleið ár 300. Hann og ein bróðir hansara vórðu tiknir av døgum við ánna Ceia í Calisiu í Norðurspania.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*



# Diamantbrúðarparið Anna og Jákup Kass

**27.11.2009**

**Til mammu og pápa á diamantbrúðleypsdegnum.**

*So eydnurík – tað sigast má*
*At eiga tykkum okkum hjá*
*Tit altíð hava fjálgað væl*
*Vár takkarkvøða ljóða skal.*

*Við umsorgan, kærleika - barnaár góð*
*Sum fyrimynd tit vístu oss slóð*
*Altíð tað góða orðið frambera*
*Í heimi, í yrki vár styrki skal vera*
*Eitt jaligt sinni ávøkstur ber*
*Tað vegin og lívið ljósari ger.*

*Hvønn dag tit oss fevna*
*Í bøn okkum nevna*
*Sterk eru kærleikans bond*
*Tit okkum øll leggja í Harrans hond.*

*Ei orðini rúma vár takksemi her*
*Tøkkin av øllum til Guð hon fer*
*At okkum untist foreldur so trúgv*
*Í seksti ár nú hava havt búgv*
*Mong eru ár, og gránað hár*
*Rík minnir vit goyma í hjørtum vár.*

Góðu mamma og pápi, hjartaliga til lukku á hesum stóra degi. Takk fyri alt, tit eru fyri okkum. Má Harrin framhaldandi signa lívsleið tykkara.

**Ynskja Marjan, Bartal og Karin**

# Edith við framsýning og verkstaði

Hósdagin 3. desember lata dyrnar upp í Dr. Jakobsensgøtu 5 í Havn við eini listaframsýning og livandi verkstaði.

Tað er listakvinnan Edith Mørkøre, ið hevur framsýningina og verkstaðin, sum verða opin allan desember mánað.

Edith málar út frá menniskjaligum virðum, og á framsýningini verður abstrakt/ekspresionistiskt list at síggja. Íblásturin til málningarnar hevur hon frá viðurskiftum, sum rørast í tí dagliga lívinum, og hendingum sum hon ella onnur rundan um hana koma út fyri. Meira fæst at vita á heimasíðini www.EdithArt.com.





*Listakvinnan Edith Mørkøre hevur framsýning og verkstað í Dr. Jakobsensgøtu 5*